# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Mia á Heygum áttati

Ídag fyllir Mia á Heygum áttati ár. Hon varð borðin í heim í Vestmanna hin 10. august 1924 og hevur búð í heimbygdini øll hesi árini. Foreldrini vóru Maria Hummeland og Hálvdan Haldansen. Sum ung tænti hon hjá apotekaranum í Havn, hetta var stríðsárini, og tá gekk hon eisini á húsarhaldsskúla í høvuðsstaðnum. Komin norður aftur til heimbygdina arbeiddi hon í Klæðnabúðini. Nakað væl eftir stríðslok hittust tey bæði Brynjolfur á Heygum, sonur hin navnfræma Ólav á Heygum, og gingu tey saman í hjúnalag í 1953. Brynjolfur hevði egið virkið og tá fór Mia at taka sær av húsinum burturav. Tey bæði eiga tvey børn, sum bæði eru alkend í Føroyum. Bjørn á Heygum advokat, samfelagsrevsara og fyrrverandi politikkara og songlerkin Rúnu á Heygum. Mia kom at sita einsamøll tá ið maðurin doyði hin 19. juli 1986. Mia hevur verið ein dugnalig kona og hevur røkt starvið sum húsmóðir, mamma og omma fyrimyndarliga. Og í Føroyum man hon best vera kend fyri at svimja á vánni í Vestmanna at kalla hvønn dag, eitt ítriv sum byrjaði í 1961, av heilsuávum, og seinri gjørdist ein góður vani. Sjónvrpið gjørdi eitt innslag um hetta fyri nøkrum árum síðani og tað eru tað mong sum minnast og taka til. Tað hevur verið stimbrandi at kent eina so positiva, glaða og viðeiriliga kvinnu, ið bara er við tí góða orðinum. Blíðskapurin er altíð í hásæti og stákanin øgilig tá ið komið verður á gátt. Hon fylgir væl við í tí sum fyriferst í samfelagnum og hevur sína meiningar um øll lívsins viðurskifti, eisini um politikk. Og tað er onki yvir at dylja, at í politikki hava hon og sonurin ikki altíð drigið eina línu. Hon liggur uttarlagað á fullveldisvonginum. Ongin, sum ikki veit tað frammanundan, hevði hildið, at hon nú fer um kappaaldur. Hennara ungdómliga sinni ger, at hon tosar við ungdómar, sum var hon um sama aldur. Í vikuni sum fór, legði hon av landinum við Norrønu, og nú hon fyllir runt, er hon á veg í bivreið av eysturlandinum og vestur eftir Íslandi saman við næstu fjølskyldu síni. Mia eigur 5 ommubørn. Hjartaliga tillukku við degnum.

*tj*



## Dagurin

**Laurentius.** Lavrasmessa: Laurentius var ein av teimum best kendu halgimonnum í Norðurlongum. Hann var prestur og skattmeistari hjá pávanum Sixtusi II. Í árinum 258 varð hann tikin og illa píndur; m.a. verður sagt frá, at hann var stoktur á eini rist og skuldi rópa, áðrenn hann andaðist: "Nú er stokt hesumegin. Vendið nú steikini."

Kend er eisini halgisøga um, at hann við hjálp frá trøllinum Finn eftir einari nátt bygdi dómkirkjuna í Lund. Hjálparmaðurin hevði kravt í løn sól og mána og Lavrasar eygu blá, men hann gitti navnið á trøllinum og fekk vald á tí. Í einari føroyskari vísu um hesa halgisøgu verður m.a. sungið:

*Grát ikki, grát ikki lítil kind,*
*í morgin kemur faðir tín Finn*
*bæði við sól og mána*
*og eygunum í Lavras í Lund.*

Navnið er latín og merkir *hin lavrberjakrýndi.*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 33, 2004
www.kaupthing.fo

# Er USA uppsteðgað?

Stórhendingin í farnu viku var fríggjadagin, tá kunngjørt var, at einans 32.000 fólk vóru sett í starv í USA í juli. Tíðindini komu sum ein veruligur smeitur fyri fíggjarmarknaðirnar, tí væntað var eitt tal á 240.000. Marknaðirnir ávirkaðust ógvusligt og beint eftir kunngerðina lækkaði t.d. danska 10-ára rentan úr 4,29% í 4,19%, dollarin viknaði um 1,7% og partabrøv lækkaðu.

Eftir at ávísar búskaparligar uppgerðir vóru vánaligar fyrr í summar, er spurningur settur við, um amerikanski búskapurin er uppsteðgaður. Greitt er, at hetta er ov tíðliga at siga nakað um enn. Hóast flestu búskapartøl úr USA í seinastuni eru vorðin bjørt aftur, og tí benda á, at væl stendur til í USA, hevur nevnda arbeiðsmarknaðarfrágreiðing tó størstu árin á marknaðirnar í løtuni.

Vánaliga frágreiðingin kann fáa amerikanska tjóðbankan at endurskoða teirra tillaging av rentustøðinum soleiðis, at hetta nú fer at hækka við lægri ferð. Fyrsta ábending um eina broytta tillaging kann koma týskvøldið, tá amerikanski tjóðbankin (FED) hevur rentufund. Tá fer FED væntandi at hækka rentuna úr 1,25% í 1,50%, orsakað av prísvakstrartrýstinum, men nú er vorðið óvist, um rentan, sum áður væntað, verður hækkað aftur í september. Tíðindafundurin hjá FED týskvøldið verður tí sera týðandi fyri, hvussu serliga styttru lánsbrøvini fara at hátta sær í næstum.

Eftir vánaligu frágreiðingina, er oljuprísurin komin enn meira í andglettin. Oljan hevur dagliga sett nýtt prísmet, men seinastu dagarnar hava vit, sum nakað nýtt, eisini sæð lækkandi oljuprís. Hetta kann tulkast, sum at prísurin, í øllum førum fyribils, hevur nátt loftinum; prísurin kann kortini hækka meira. Hendir hetta, kann oljan ávirka búskaparframgongdina í heiminum og sostatt eisini gongdina á láns- og partabrøvunum.

Enn bendur tó alt á, at rentustigið sum heild, sum frálíður er hækkandi og at rentuhækkingartillagingin í USA fer at halda áfram. Fyrsta evropiska rentuhækkingin verður tó framvegis ikki at síggja fyrr enn um ársskiftið.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,52% | -0,11% |
| 5 ára lánsbræv | 3,56% | -0,14% |
| 10 ára lánsbræv | 4,22% | -0,13% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 265,1 | -0,3% |
| OMX, Svøríki | 659,5 | -2,9% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.604,5 | -3,4% |
| S&P 500, USA | 1.064,0 | -3,9% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,59 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 166,19 | 0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 76,23 | -1,5% |
| Altjóða Vøkstur | 60,12 | -1,5% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 606,05 | -2,0% |
| EUR | 743,47 | 0,0% |
| GBP | 1.116,85 | -1,1% |
| NOK | 89,20 | 1,3% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



Kiri Te Kanawa:

# Konsert í heimsklassa á listastevnuni

**Leygarkvøldið 7. august var eitt heilt serligt kvøld í føroyskari tónleikasøgu, tá ein av heimsins mætastu operasangarinnum, Kiri Te Kanawa, sang fyri fullsettum sali í Norðurlandahúsinum**

ORÐ OG MYNDIR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Kiri Te Kanawa á veg út úr Norðurlandahúsinum saman við ferðaleiðaranum Nick Grace eftir konsertina leygarkvøldið. Her takkar 12 ára gamla havnargentan Maria Heinesen henni fyri konsertina*

Tað er ikki á hvørjum degi, at vit í Føroyum fáa vitjan av heimskendum persónum. Men tey, sum leygarkvøldið vóru til konsertina hjá Kiri Te Kanawa í Norðurlandahúsinum, upplivdu hæddarpunktið í skránni hjá Listastevnu Føroya 2004, tá heimskenda sangkvinnan bergtók áhoyrararnar við síni avbera vøkru sopranrødd.

Fyri nógv av teimum, sum sjálvi syngja, man Kiri Te Kanawa vera ein av stóru fyrimyndunum.

Navnframi klaverspælarin Julian Reynolds og Kiri Te Kanawa framførdu meistarliga og harmoneraðu sera væl. Julian Reynolds, sum í mong ár hevur samstarvað við Kiri, er føddur í London og býr í Spanien, hann er giftur við eini operasangarindu.

60 ára gamla Kiri Te Kanawa hevur eina fantastiska rødd, hon skifti skjótt millum lágar og heilt høgar tónar, uttan at tað sást á henni, hon virkaði fullkomiliga avslappað, og á ein charmerandi hátt bergtók hon áhoyrarnar.

Hon sang úr verkum hjá Handel, Vivaldi, Mozart, Strauss, Berlioz og øðrum.

Kiri Te Kanawa setur stór krøv til umhvørvið, sum hýsir framførslum hennara. Alt skal vera í besta standi, ljóðgóðskan í salinum skal vera perfekt. Eingin skal kunna siga, at sangframførslurnar kundu verið betri. Norðurlandahúsið livdi fult upp til hesi krøv.

Sangkvinnan er fødd í Ný Sælandi í 1944. Sum 20 ára gomul hevði hon longu vunnið fleiri virðislønir í heimlandinum, men stóra gjøgnumbrotið kom fyrst í 70-unum, nøkur ár eftir at hon var flutt til London, har hon fekk stjørnustatus sum sangari á Royal Opera House, Covent Garden. Hon sang t.d. í St. Paul´s dómkirkjuni í 1981, tá Charles krúnprinsur og Diana prinsessa vórðu vígd.

Í ferðalagnum, sum kom til Føroya fríggjadagin og fór av landinum sunnudagin, vóru umframt Kiri Te Kanawa og klaverspælarin Julian Reynolds, Susanne Kristiansen úr Danmark og Nick Grace sum vanliga er tourmanager hjá stórum musikalum í London. Tey vóru øll sera væl nøgd við túrin í Føroyum.



*Ein onnur kend sangrødd, Kári av Reyni, segði eftir konsertina, at hetta var ein av hansara størstu sangupplivingum – ein ógloymandi konsert*



*Brøðurnir Ólavur og Jóannes á Váli, sum báðir fáast nógv við sang og tónleik, vóru væl nøgdir við konsertina*



*Privatbilførarin Ole Valle syrgdi fyri tryggum flutningi av heimskendu sangkvinnuni, meðan hon var í Føroyum*



*Okkara heimligu sangstjørnur Gunnvør Poulsen, Joanna Johansen og Berghild Poulsen, sum allar syngja við í Havnarkórinum og Tarira, hjá Sunleifi Rasmussen og Ólavi Hátún, søgdu, at konsertin var allar pengarnar verd*



*12 ára gamla Maria Heinesen, sum sjálv spælir violin, var ein av teimum heilt fáu, sum fingu høvi at heilsa upp á heimskendu sangkvinnuna. Her er Maria saman við foreldrunum Jakku og Káru Heinesen*